**Røða í sambandi við fyrilestur hjá Bláa Krossi 18. Sept. 2019**

Góðan dag, øll somul.

Takk fyri, at eg varð boðin at siga nøkur orð í dag, og hjartans tøkk skulu tit í Bláa Krossi hava fyri, at tit skipa fyri hesum áhugaverda og týdningarmikla tiltaki.

Hjertelig velkommen til Færoyene, Frid Hansen. Dette er jo ikke første, men tredje gangen, du besøker vort land, og jeg glæder mig til at høre din forelæsning om dette veldig viktige emne!

Tað eru einans fáir dagar síðani nýggja samgongan tók við, og eg eri so sera fegin um, at júst hetta skuldi blíva ein av mínum allarfyrstu uppgávum sum landsstýriskvinna í almannamálum.

Vit í nýggju samgonguni ásanna, at eingin keta er sterkari, enn veikasta liðið, og vit hava sett okkum fyri, at vit vilja fremja ein virknan politikk á almannaøkinum, har borgarin er í miðdeplinum.

Børn hjá foreldrum, sum hava rúsdrekka trupulleikar, hava serligan tørv á stuðli og umsorgan, og hetta er eitt øki, sum eg heilt sikkurt fari at arbeiða við sum landsstýriskvinna.

Tað er mín vón, at vit – øll vit vaksnu – lurta eftir børnunum og vísa teimum, at tað *ongantíð* er teirra ábyrgd, men at tað altíð eru vit vaksnu, sum skulu veita teimum tryggleika.

*Barndómurin varir alt lívið* er heitið á fyrilestrinum, sum vit skulu hoyra um eina løtu. Í hesum liggur sjálvandi, at tað, vit uppliva sum børn, merkir okkum og fylgir okkum gjøgnum alt lívið. Hava vit havt ein ótryggan og turbulentan barndóm, kann hetta elva til trupulleikar seinni í lívinum.

Tøl hjá danska Bláa Krossi vísa millum annað, at 10 prosent av børnum, sum vaksa upp í familjum við rúsdrekkamisnýtslu, fáa sálarligar diagnosur seinni í lívinum. Tøl vísa eisini, at ein triðingur av vaksnum børnum úr familjum við rúsdrekkamisnýtslu, sjálvi gerast misnýtarar, tá tey eru vaksin.

Hetta eru tøl, ið tala. Og hetta vísir okkum, hvussu ómetaliga stóra ábyrgd vit vaksnu hava at tryggja øllum okkara børnum ein góðan og tryggan barndóm.

Í Bláa Krossi verður gjørt eitt megnararbeiði at viðgera fólk, sum hava trupulleikar við rúsevnum.

**Stóra tøkk skulu tit hava fyri tað!**

Samgongan hevur sett sær fyri, at vit vilja bøta um viðgerðarmøguleikarnar hjá kvinnum, ið hava rústrupulleikar eins og um tilboðini til børn og ung, sum vaksa upp í heimum við sálarsjúku og rúsmisnýtslu.

Eg fari við góðum treysti undir hetta og fegnist samstundis um tað stóra arbeiðið, tit og onnur gera at hjálpa hesum fólkum – okkara børnum, vaksnu eins og samfelagnum øllum at frama.

At enda fari eg enn einaferð at takka fyri, at eg varð boðin higar at siga nøkur orð og fari at ynskja tykkum alt tað besta!

Takk fyri!

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir**
**landsstýriskvinna**